ítróttur

Nr. 234 • týsdagur • 7. desember 2004 • 78. árgangur • www.sosialurin.fo

# MB og SÍF skulu spæla seinna dystin

**Dómsnevndin hjá Fótbóltssambandinum hevur gjørt av, at seinni dysturin millum MB og SÍF um rættin til lið í 2. deild komandi ár skal spælast**

FÓTBÓLTSÓSEMJA
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Nógv rumbul hevur verið um dystirnar millum MB og SÍF, um hvør av teimum skal eiga rættin til lið í 2. deild komandi kappingarár. Fyrri dysturin endaði við einum 3-0 sigri til sandavágsmenn. Av tí at MB, sambært kappingarnevndini hjá FSF, nýtti fleiri ólógligar leikarar í tí dystinum, bleiv eisini avgjørt, at feløgini undan seinna dystinum skuldu senda dómaraseðilin inn til fótbóltssambandið dagin fyri dystin, so at FSF kundi kanna eftir, at allir leikararnir á dómaraseðlinum høvdu loyvi at spæla. Eisini varð MB dømt at gjalda 5.000 krónur í bót.



*Dómsnevndin hjá Fótbóltssambandinum hevur gjørt av, at seinni dysturin millum MB og SÍF skal spælast, og feløgini noyðast ikki at lata dómaraseðil inn fyrr enn hálvan tíma fyri dystarbyrjan*

*savnsmynd*

### Dómaraseðilin avleverast hálvan tíma undan dystinum

Miðvingar noktaðu at spæla seinna dystin, og MB kærdi avgerðina hjá kappingarnevndini til dómsnevndina, og dómsnevndin hevði um vikuskiftið fund, har málið bleiv viðgjørt.

Niðurstøðan hjá dómsnevndini er tann, at seinni dysturin millum feløgini skal spælast. Dysturin skal spælast í Sandavági, og MB skal gjalda dómarasamsýningarnar í sambandi við dystin. MB fær tó eisini allar inntøkurnar av atgongumerkjasøluni til dystin. Bótin, sum MB varð dømt at gjalda, stendur eisini við, sigur dómsnevndin.

Sum áðurnevnt avgjørdi kappingarnevndin hjá FSF undan tí ætlaða seinna dystinum, at feløgini skuldu lata dómaraseðilin inn til FSF dagin fyri sjálvan dystardagin. Hesum tekur dómsnevndin hjá FSF tó ikki undir við, og nevndin hevur tí broytt avgerðina til, at feløgini skulu avlevera dómaraseðil bert hálvan tíma áðrenn, at dysturin verður settur í gongd.

Nær seinni dysturin millum MB og SÍF verður leiktur, er enn ikki ásett, men fótbóltssambandið vil hava, at dysturin verður avgreiddur sum skjótast.

### Anderson framvegis átta daga leikbann

Bert eitt annað mál var á fundarskránni hjá dómsnevndini, og tað var ein kæra frá B68 um dómin hjá kappingarnevndini, har brasilianski leikarin hjá felagnum, Anderson, varð dømdur átta daga leikbann í sambandi við eina útvísing, sum hann tiltuskaði sær í dysti móti EB/Streymi seint í farna kappingarári.

# Julian leikandi venjari á Toftum

**Fríggjakvøldið bórust tíðindini um, at landsliðsleikarin Julian Johnsson komandi kappingarár skal verða leikandi venjari hjá B68 í 2. deild**

VENJARASETAN
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Tað kom sum ein bumba fyri tey allarflestu, at 29 ára gamli landsliðsleikarin eftir at hava verið yrkisleikari uttanlands í fleiri ár bráddliga valdi at venda heim aftur á klettarnar og gerast leikandi venjari hjá einum 2. deildarliði.



*Tíðindi um, at Julian Johnsson skal verða leikandi venjari hjá toftamonnum, komu sum ein bumba fyri allan tann føroyska fótbóltsheimin.*

*savnsmynd*

### Toftamenn stíla høgt

Við setanini av Julian Johnsson sum leikandi venjara, hava toftamenn týðuliga meldað út, at teir ætla sær ikki einki komandi ár. Frammanundan hevur B68 tryggjað sær, at bæði Arnbjørn Danielsen og Jann Ingi Petersen kom heim aftur til barndómsfelagið, og lítið man verða at ivast í, at B68 fer at hava helst sterkasta hópin í næstfremstu deildini komandi ár.

Við útvarpið sunnukvøldið segði Julian Johnsson, at bæði hann og leiðslan í felagnum hava sum mál, at B68 skal beina kós upp aftur í fremstu deildina. Sjálvur hevur Julian gjørt ein tvey-ára sáttmála við B68, men bert fyrra árið er hann settur sum venjari, tí um B68 flytir upp í 1. deild árið eftir, so er neyðugt hjá felagnum at hava ein venjara, sum hevur tey neyðugu skeiðini, ið FSF krevur, og hesi hevur Julian ikki enn.

### Heldur fram á landsliðnum

Spurdur um hetta ikki var at seta landsliðssessin hjá sær upp á spæl, sigur Julian Johnsson, at tað er upp til venjaran at avgerða, um hann er nóg góður til at verða við á føroyska landsliðnum. Julian Johnsson er ein tann royndasti leikarin í føroyska landsliðshópinum.

– Eg havi tikið hesa avgerð út frá mínum persónligum ynskjum. Eg vóni bara, at landsliðsvenjarin metur meg verða nóg góðan til landsliðið, hóast eg spæli í 2. deild, sigur Julian Johnsson.

Vit hava roynt at fingið fatur á Henrik Larsen, landsliðsvenjara um eina viðmerking til avgerðina hjá Julian, men tað eydnaðist okkum tíverri ikki.

Í síni tíð sum yrkisleikari uttanlands hevur Julian Johnsson leikt við Kongsvingar og Sogndal í Noreg, Hull í Onglandi og ÍA Akranesi í Íslandi.

## Høgni til KÍ

19 ára gamli Høgni Madsen skal næsta kappingarár spæla við KÍ. Tað gjørdist greitt, eftir at partarnir samdust um eina avtalu fríggjadagin. Hóast hann er einans 19 ár, so hevur Høgni Madsen longu roynt seg á besta liðnum hjá bæði ÍF, har hann leikti farna kappingarár, og hann hevur somuleiðis leikt við best liðnum hjá GÍ, har hann var næstseinasta kappingarár.

Ungi miðvallarin úr Fuglafirði hevur gjørt eina eitt ára avtalu við klaksvíkingar.